# Treytir og mannagongdir viðvíkjandi fyribils innflutningi av akførum til Íslands við Norrönu

Íslendska toll og skattastovan eggjar øllum, ið innflyta akfør við útlendskari nummarplátu, sum hava til endamáls at nýta akfarið í Íslandi, at nærlesa reglugerðirnar fyri fyribils tollfríðum innflutningi av akførum.

Fá meira nágeiniliga kunning við at trýsta á leinkjuna her.

*Ert tú ávegis til Íslands við einvegis ferðaseðli, eins og tú steðgar í Íslandi í meira enn 3 mánaðir, verður tú biðin um at útfylla E9 oyðublaðið her, fyri síðani at senda tað til e9@smyrilline.fo*

## Ferðafólk í Íslandi

Einstaklingar við føstum bústaði uttanfyri Ísland, sum koma til Íslands sum ferðafólk, kunnu nýta teirra akfør í Íslandi í mesta lagi 12 mánaðir treytað av at ávísar treytir verða hildnar.

Einstaklingar ið hava ferðaseðlar báðar vegir, hava ikki skyldu til at útfylla oyðublað E9 um tey steðga minni enn 3 mánaðir í Íslandi.

Einstaklingar ið koma til Íslands við einvegis ferðaseðli, ella hava ætlanir at verða í Íslandi í meira enn 3 mánaðir, hava skyldu til at útfylla oyðublaðið E9. Oyðublaðið fæst her, og skal tað sendast til E9@smyrilline.fo, áðrenn farið verður úr Hirtshals.

Ein og hvør ið hevur skyldu at leggja fram oyðublað E9 (góðkenning av fyribils innflutningi) verður biðin um at hava eitt avrit av oyðublaðnum í akfarinum.

Avrit av ferðaseðilinum til og frá Íslandi, kann nýtast sum prógv fyri at vísa á, at akfarið fer aftur av landinum.

Ein og hvør ið fær fastan bústað í Íslandi hevur skyldu til at seta seg í samband við tí Íslendsku toll og skattastovuna. Hetta er eisini galdandi, um ein fær ein fastan bústað í Íslandi innan 12 mánaðir.

## Vinnulig endamál

Akfør, ið verða nýtt til vinnulig endamál, eiga at hava bílagt flutning við Smyril Line Cargo, áðrenn fráferð. Vinarliga seti tykkum í samband við island@cargo.fo, í sambandi við bílegging og kunning.

## Fastan bústað í Íslandi

** Galdandi bæði altjóða og íslendsk ferðandi **

Ferðandi, ið eru ríkisborgarar í Íslandi, og hava fastan bústað í Íslandi, mugu IKKI koma til Íslands við akførum, ið hava útlendska nummarplátu, uttan so akfarið er skrásett sum flutningsfar áðrenn fráferð.

Vinarliga seti tykkum í samband við Smyril Line viðvíkjandi kostnaði, eins og førd mannagongd. Teldupostur: island@cargo.fo

Nærri kunnleika um undantøk viðv. reglugerðunum um fyribils innflutning av akførum, sæst á heimasíðuni hjá Íslendsku toll og skattastovuni her.

## Fyribils arbeiði í Íslandi

Ferðandi, ið hava fyribils arbeiði í Íslandi, kunnu nýta teirra akfar í Íslandi upp til 12 mánaðir. Tó verða tey noydd til at útfylla E9 oyðublaðið elektroniskt, áðrenn fráferð úr Danmark. Eftir at oyðublaðið er útfylt, skal tað sendast við telduposti til e9@smyrilline.fo

Eisini hevur tú skyldu at hava tvey útfylt og printaði avrit at hesum oyðublaði í akfari tínum, áðrenn komið verður til Seyðisfjarðar.

Nærri kunning er at finna á heimasíðuni hjá Íslendsku toll og skattastovuni her.

Verður støðan hinvegin tann at tú fært fastan bústað í Íslandi innanfyri teir 12 mánaðirnar tú hevði fyribils arbeiði, skal akfarið skrásetast í Íslandi. Um ikki, verður akfarið flutt aftur úr landinum. Vinarliga setið tykkum í samband við Smyril Line viðvíkjandi skráseting island@cargo.fo

## Búsetast í Íslandi

Fólk sum flyta til Íslands, kunnu skráseta teirra akfør sum ”Personal Goods”, um tey hava havt teirra akfar í meira enn 1 ár. Akfarið má skrásetast sum flutningsfar áðrenn fráferð. Vinarliga vendi tykkum til Smyril Line viðvíkjandi kostnaði og mannagongdum. Teldupostur: island@cargo.fo

Ferðandi, ið eru lesandi, kunnu nýta teirra akfar upp til 12 mánaðir. Hetta er galdandi frá dags dato, eftir at tey eru komin til Íslands. Ferðandi ið eru lesandi, mugu útfylla E9 oyðublaðið elektroniskt, fyri síðani at senda tað við mail til Smyril Line: e9@smyrilline.fo

Reglugerðirnar fyri at skifta frá at hava ein fyribils, til fastan bústað í Íslandi, er eisini galdandi fyri lesandi.

*Fyri nærri kunning, eins og spurningar eru tit vælkomin at venda tykkum til e9@smyrilline.fo ella ringja til Smyril Line Iceland á +354 4702808 ella +354 4702800.*